# Nøvn

## Føðingar



*Týsdagin 8. mars fingu Rannvá Mortansdóttir og Hjalmar Didriksen Apol, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3768 gr og var 52 cm langur. Her situr hann hjá stolta stórabeiggjanum, Baldur.*

Týsdagin 8. mars fingu Rannvá Mortansdóttir og Hjalmar Didriksen Apol, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 3768 gr og var 52 cm langur. Her situr hann hjá stolta stórabeiggjanum, Baldur.

10. mars fingu Wilhelmina Poulsen og Signar Magnussen, Vági, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4900 gr.

10. mars fingu Mona Lisberg og Jón Jespersen, Økrum, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4400 gr.

11. mars fingu Sigrun Joensen, Kollafirði, og Mortan Bisp, Argjum, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3547 gr.

17. mars fingu Elin Doris og Jóhan á Mýrini, Miðvági, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3150 gr.

17. mars fingu Maria og Viggo Johannesen, Saltangará, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3325 gr.

18. mars fingu Durita Poulsen og Rógvi D. Kjærbo, Sumba, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2350 gr.

21. mars fingu Milvian og Kári Poulsen, Eiði, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3400 gr.

23. mars fingu Borgfríð Nybo Hansen og Hjalmar Nólsoy Jacobsen, Nólsoy, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

# Axel Tórgarð

## f. 31. mars 1923, d. 24. mars 2011



Axel Tórgarð doyði hósmorgunin, næstan áttatiátta ára gamal.

Við honum er ein góður maður farin, og fyri konuna og børn og abbabørn er saknurin stórur, og øll vit, sum kendu hann, hava ta djúpastu samkenslu við teimum í hesum tungu døgum.

Samstundis kunnu vit øll fegnast um at hava livað í hesum fagra landi saman við einum slíkum manni sum honum. Hann var altíð jaligur, og er ein av teimum, sum hevur lyft mál og mentan okkara upp á eitt hægri støði.

Men hann var eisini úr góðum bergi brotin. Hann er havnarmaður, og faðir hansara var arkitekturin Hans Tórgarð. Móðir hansara var Valborg Eide úr Nólsoy. Børnini vóru fyri tí vanlagnu, at móðirin doyði frá teimum. Axel varð tó verandi heima, gekk í kommunuskúlan í Havn, og tá Studenta- og preliminerskeið Føroya Løgtings varð sett á stovn í 1937, fór hann hagar.

Tvey ár eftir var hann ein av fýra sum fingu preliminerprógv. Hann helt beinanvegin fram á studentaskeiðnum, og fekk sum ein av fimm næmingum studentsprógv í 1941. Tá var ikki so vanligt sum í dag at fáa hægri útbúgving.

Tá vóru Føroyar hersettar av bretum, og eitt av mongum, sum hann gjørdi, nú hann ikki slapp av landinum, var at starvast sum týðari hjá teimum. Annars fóru hann og tann seinni dýralækning Dánjal Jákup Bærentsen um alt landið at geva fólkum gassmaskur, og var hann eisini læraravikarur.

Eftir kríggið bar til at sleppa at lesa, og fór hann niður til Keypmannahavnar, har hann í 1954 tók guðfrøðiligt embætisprógv, og 11. november sama ár fekk hann starv sum kalskapelánur í Suðurstreymoyar prestagjaldi. Umframt at vera prestur hevði hann tímar í latíni bæði til ta lítlu latínroyndina og á studentaskúlanum. Men ein dag kundi hann siga teimum undrandi næmingunum frá, at Edw. Mitens, landsstýrismaður, hevði sent boð eftir sær og spurt, um hann vildi gerast stjóri í tí útvarpi, sum løgtingið hevði samtykt at seta á stovn. Hann hevði tikið av, og var tað ómetaliga spennandi at fara í gongd við nakað heilt nýtt, og so serliga fyri Føroya fólk at hoyra fyrstu sendingarnar. Siglt varð við smáum seglum, starvsfólkini vóru bara Hjørdis Thomsen úr Nólsoy og Elias í Rættará, og tey høvdu innivist í einari hædd niðri á Bryggjubakka. Tey megnaðu tó at senda fleiri ferðir hvønn dag, og tað vóru áhugaverdar sendingar, sum fólk lurtaðu sera spent eftir. Men í 1960 var eitt starv sum sóknarprestur leyst í

Norðurstreymoy. Tað søkti hann og varð hann settur í starvið 1. juli 1960.

Meðan hann var útvarpsstjóri, giftist hann í 1958 við Margretu, dóttur Sørin Danielsen á Ryggi í Miðvági. Húskið var sera vælkomið í Kvívík. Axel var ein góður prestur. Hann var altíð væl fyrireikaður til alt tað hann skuldi gera.

Prædikurnar skrivaði hann væl og virðiliga niður, og altíð kom hann í góðari tíð til alt tað, sum gerast skuldi. Tað var tó ikki so, at hann skrivaði niður langt frammanundan. Nei, prædikuna til guðstænastuna skrivaði hann tíðliga sunnumorgun!

Annað skrivligt arbeiði gjørdi hann eisini. Hann var uppi í tí arbeiði, sum bygdarfólkið fekst við í bygdarhúsunum, og týddi sjónleikir, sum vórðu førdir fram fyri fullum húsum, og mangan fóru tey av bygdini at føra fram hesar leikir. Hetta var tó ikki alt. Hann skeyt upp fyri eftirmanni sínum sum útvarpsstjóri, Niels Juel Arge, at senda morgunlestrar, sum ein prestur skrivaði og ein deknur las upp. Ár um ár skrivaði hann hesar morgunlestrar, og eitt úrval av teimum gav hann út í 1988. Harumframt yrkti hann tættir til V4-sendingar, og teir komu mangan væl við hjá teimum, sum har skipaðu fyri.

Hann týddi sjónleikin Julius Caesar eftir William Shakespeare, og fleiri skaldsøgur afturat.

Í 1979 fekk hann starv sum sóknarprestur í Suðurstreymoy, men búði framvegis í Kvívík. Tá fekk hann eitt strik, og merkti hetta hann likamliga, men hevði als onga ávirkan á skrivligu arbeiðsorku hansara. Hann helt fram at týða og hevur í heilt ótrúligan mun vaksið um okkara bókmentir. Tað var tí uppiborið, at hann gjørdist heiðurslimur í Rithøvundafelagnum, og tað var hann sera glaður fyri.

**Zakarias Wang**



## *Sakni teg hvønn dag*

*Tá ljósini slókna um kvøldið, og tankarnir flúgva avstað.*  
*Tá sakni eg teg.*  
*Havi bert minnini her hjá mær, aldri eg gloymi teg.*

*Alt vit gjørdu saman, tað er nú søga.*  
*Men tú fert altíð at vera her, við mina lið.*  
*Og sjálvt um tú ert á øðrum stað, so sakni eg teg - hvønn dag.*

*So stuttligur so sterkur og so vísur*  
*Eg sakni teg- góði babba....*  
*Men eg veit at vit síggjast aftur*  
*Undir stóra fossinum*

**Elinborg**